LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 24. februar 2025
J.Nr.: LUM-16- 24/17152-35
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit
## um
## at Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið staðfesti avgerð hjá Vørn um ikki at útskriva klagaranum fiskiloyvi 5A, men fiskiloyvi 5B

## 1. Niðurstøða umboðsmansins

*Klagað varð um, at Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið hevði staðfest avgerð hjá Vørn um ikki at útskriva klagaranum fiskiloyvi 5A, sum klagarin metti seg hava rætt til, men ístaðin útskrivaði fiskiloyvi 5B.*

*Í kæruavgerðini vísti ráðið á, at treytin fyri, at rættindahavari í bólki 5 fær fiskiloyvi 5A er, at eigarin við fiskifarinum næstseinasta álmanakkaár fyri umsóknarárið hevur avreitt fyri minst 200.000 kr. Ráðið góðkendi siðvenjuna hjá Vørn um at knýta fiskifar og avreiðingarvirði saman. Hetta gjørdi, at klagarin, sum hevði útvegað sær annað fiskifar í 2023, ikki leyk treytirnar fyri fiskiloyvi 5A, tá hann søkti um fiskiloyvi fyri 2024.*

*Umboðsmaðurin viðmerkti, at hann helt, at siðvenjan at knýta nýggja fiskifarið at ásetingini í § 2 stk. 1 nr. 1 í kunngerð nr. 76 frá 2019 var ivasom, men at hann hevði ikki grundarlag fyri at siga, at siðvenjan var beinleiðis í stríð við ávísa lógar– ella kunngerðaráseting.*

*Umboðsmaðurin helt tað verða eitt lýti við Sjófeingislógini og tilhoyrandi kunngerðini, at eingin áseting fyriskipar, hvørja ávirkan skift av fiskifari hevur á spurningin um rættin til fiskiloyvi 5A ella 5B. Umboðsmaðurin heitti tí á ráðið um sum skjótast at gera lóggávu, sum skipar hesi viðurskifti.*

## 2. Málslýsing

Tann 5. januar 2024 sendi Vørn hesa avgerð til klagaran sum svar uppá umsókn hansara um fiskiloyvi A í bólki 5:

> "A hevur tann 14.02.2023 keypt bátin B ... frá D, við fiskiloyvi í bólki 5. Fyrrverandi eigarin av E, hevði frá 09.01.23 - 14.02.23 eitt fiskiloyvi í bólki 5A.
>
> Tann 16.02.2023, fekk B, eftir umsókn, útskrivað fiskiloyvi í bólki 5B. B, hevur aftur tann 1. januar 2024, eftir umsókn, fingið útskriva fiskiloyvi í bólki 5B. Fiskiloyvi í bólki 5A verður einans skrivað út til eigara av báti, ið lýkur treytirnar í § 2, stk. 1, nr. 1 í kunngerð nr. 76 frá 22.mai 2019. Sambært hesi áseting kann fiskiloyvi í bólki 5A verða skrivað eigara av fult riknum fiskifari í bólki 5, um eigarin við fiskifarinum næstseinasta álmanakkaárið fyri umsóknarárið, hevur avreitt fyri minst 200.000 kr. Tað er sostatt avgerandi, at eigarin av

fiskifarinum, tað er í hesum føri A, við fiskifarinum, tað er í hesum føri B, hevur avreitt fyri minst 200.000 kr. í 2022.

A var ikki eigari av bátinum í 2022, tískil er ikki grundarlag fyri at skriva A - B, eitt fiskiloyvi í bólki 5A.

Henda avgerð kann kærast innan 4 vikur frá d.d. til Fiskivinnu- og Samferðslumálaráðið"

Avgerðin varð kærd, og tann 27. juni 2024 boðaði Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið klagaranum frá, at ráðið staðfesti avgerðina hjá Vørn. Kæruavgerðin var soljóðandi:

"Kært er um avgerðina hjá Vørn frá januar 2024 um at sýta at útskriva kæraranum ... A, fiskiloyvi 5 A til fiskifari B, sambært § 2 í kunngerð nr. 76 frá 2019 ...

Ráðið staðfestir avgerðina hjá Vørn.

*Umstøðurnar í málinum*
Málið snýr seg um, at Vørn hevur skrivað kæraranum eitt fiskiloyvi í bólki 5 B. Kærarin metir seg hava rætt til eitt fiskiloyvi í bólki 5 A.

Kærarin vendi sær til Vørn í januar 2024, aftaná at fiskiloyvi 5 B varð skrivað honum. Kærarin bað um frágreiðing um, hví kærarin ikki fekk útskrivað eitt A-loyvi.

Vørn greiddi síðani frá, at grundarlag var ikki at skriva kæraranum eitt A-loyvi, tí kærarin leyk ikki treytirnar fyri hesum, sambært § 2, stk. 1, nr. 1 í kunngerð nr. 76 frá 2019. Vørn vísti á, at fiskiloyvi í bólki 5 A einans kann skrivast eigara av fult riknum fiskifari í bólki 5, um eigarin við fiskifarinum næstseinasta álmanakkaárið fyri umsóknarárið hevur avreitt fyri minst 200.000 kr. Kærarin var ikki eigari av fiskifarinum í 2022, og tískil metti Vørn ikki, at grundarlag var fyri at skriva út fiskiloyvi í bólki 5 A.

Kærarin førdi síðani m.a. fram, at Vørn við avgerðini hevði stillað kæraran og felag hansara verri enn frammanundan, hóast virksemi hansara hevði verið tað sama seinastu nógvu árini. Kærarin vísti á, at hann í nógv ár og uttan avbrot hevur lokið treytirnar fyri einum fiskiloyvi í bólki 5 A. Kærarin heitti á Vørn um at koma við eini frágreiðing um, hví Vørn metti hansara støðu at vera fevnda av § 2, stk. 1, nr. 1 í kunngerðini, tí hann sjálvur metti sína støðu at vera fevnda av § 2, stk. 5 í kunngerð nr. 76 frá 2019.

Vørn vísti á, at ásetingin í § 2, stk. 5, sum kærarin vísti á, ikki er í gildi sambært § 5, stk. 3 í kunngerðini. Vørn kundi tí bert fyrihalda seg til § 2, stk. 1, nr. 1 í kunngerðini, og tí stóð avgerðin við...

*Viðmerkingar og avgerð Ráðsins*
Støða skal takast til, um heimild er at útskriva fiskiloyvi 5 A til kæraran vegna A við fiskifarinum B.

Heimildargrundarlagið at skipa fiskiskapin hjá fiskiførum undir føroyskum flaggi í føroyskum sjógvi eru ásetingarnar í kapittul 5 í Sjófeingislógini (løgtingslóg nr. 152 frá 2019 um sjófeingi).

Í § 19, stk. 2 í Sjófeingislógini, er ásett, at fyri bólk 5, sambært § 18, stk. 1, ásetir landsstýrismaðurin nærri treytir fyri at fáa fiskiloyvi, umframt reglur um, hvussu ásetta fiskidagatalið hjá bólkinum verður brúkt og býtt millum fullriknar og ikki fullriknar útróðrarbátar, hvør er at meta sum fullrikin og ikki fullrikin útróðrarbátur, og reglur um inntøkumørk og veiðinøgdir.

Hesar treytir og reglur, sambært § 19, stk. 2 í Sjófeingislógini, hevur landsstýrismaðurin ásett í kunngerð nr. 76 frá 2019.

Sambært § 2, stk. 1, nr. 1 í kunngerðini er fiskiloyvið 5 A treytað av, at eigarin við fiskifarinum, næstseinasta álmanakkaárið fyri umsóknarárið, hevur avreitt fyri minst 200.000 kr.

Í hesum ítøkiliga máli hevur A skift fiskifarið út, og lýkur tí ikki treytina um at hava avreitt fyri minst 200.000 kr. við nýggja fiskifarinum B næstseinasta álmanakkaárið fyri umsóknarárið. Hóast avreitt er fyri meira enn 200.000 kr. við tí nýggja fiskifarinum, so er tað undanfarni eigarin, sum hevur avreitt hetta, og treytin í § 2, stk. 1, nr. 1 í kunngerðini er tí ikki lokin. Tað hevur heldur ongan týdning í hesum sambandi, at A hevur avreitt fyri meira enn 200.000 kr. við tí fiskifarinum, sum felagið átti, áðrenn tað keypti nýggja fiskifarið.

Niðurstøðan hjá Ráðnum er, at í verandi skipan er eingin heimild at skriva kæraranum fiskiloyvi í bólki 5 A. Avgerðin hjá Vørn verður sostatt staðfest.

Viðmerkjast skal at enda við, at Ráðið hevur kunnleika til tær avleiðingar, sum eru í sambandi við at skifta fiskifar út, tí treytirnar um avreiðingarvirðið í tíð eru knýttar til bæði eigaran og fiskifarið, tað vil siga at eigarin skal lúka treytina um avreiðingarvirðið við sama fiskifari. Tað hevur tó verið soleiðis í mong ár, og Vørn hevur brúkt oman fyri nevndu áseting, bæði í førum, tá eigari fær fiskiloyvi til sama bát, og tá eigari skiftir fiskifar út. Um hetta skal broytast, krevur tað eina grundleggjandi broyting av skipanini, og ikki bert eina broyting í teimum førum, tá fiskifar verður skift út.

Tað, sum er komið fram í hesum máli, verður tó tikið við í framtíðararbeiðið við at endurskoða kunngerðina. “

## 3. Klagan

Við skrivi, dagfest 4. juli 2024, sendi A soljóðandi klagu til Løgtingsins umboðsmann:

“Kæra viðv. umsókn at fáa útskrivað A-fiskiloyvi til B

Kært verður um, at myndugleikin av órøttum og á skeivum lógargrundarlagi hevur tikið avgerð um at niðurstiga virksemið hjá mínum felagi A ... frá at verða fult rikið virksemið til ikki fult rikið virksemið – frá A- til B-virksemi.

Avgerðin hjá VØRN - og eftirsíðan staðfestingin hjá Fiskimálaráðnum av avgerðini hjá VØRN - tók ikki støði í einum avreiðingarvirðið hjá felagnum, sum var minni enn 200.000 kr. – treytir sum eru ásettar í kunngerð. Avgerðin tók støði, í at A hevði út vegað sær annað fiskifar.

Sum lógargrundarlag fyri avgerðini um at niðurstiga virksemið hjá A vísir Fiskimálaráðið til § 19, stk. 2 í Sjófeingislógini ...og § 2, stk. 1, nr. 1 kunngerð nr. 76 frá 2019 ...

Undirritaði hevur yvirfyri bæði VØRN og Fiskimálaráðnum víst á, at § 2, stk. 1, nr. 1 í kunngerð nr. 76/*2019* ikki var innsett í kunngerðina fyri at regulera útskiftan av fiskifari. Tað gjørdi hinvegin § 2, stk. 5 í kunngerð nr. 76/2019, sum ásetti:

> Um ein persónur, sum lýkur treytirnar sambært stk. 1, nr. 2, keypir ein bát í bólki 5, ið lýkur treytirnar í stk. 1, nr. 1, kann hesin, eftir umsókn, fáa skrivað eitt fiskiloyvi 5 A.

Hendan ásetingin varð strikað í kunngerð nr. 217 frá 22. desember 2020... Av kunngerðarbroytingini framgongur eksplisitt, at endamálið við broytingini var at "útseta gildiskomuna fyri treytina um mark fyri lønarinntøku" . Endamálið var ikki at broyta reglurnar fyri útskiftan av fiskiførum, citat:

> Kunngerð um broyting í kunngerð um treytir fyri fiskiloyvi 5 A og 5 B og reglur um býtið av fiskidagatal- inum hjá bólki 5, útróðrarbátar undir 15 tons
>
> (Útseta gildiskomuna fyri treytini um mark fyri lønarinntøku)
>
> § 1 Í kunngerð nr. 76 frá 22. mai 2019 um treytir fyri fiskiloyvi 5 A og 5 B og reglur um býtið av fiskidagatal- inum hjá bólki 5, útróðrarbátar undir 15 tons, verður § 5, stk. 3 orðað soleiðis:
>
> "Stk. 3. § 2 kemur í gildi 1. januar 2021, tó undantikið § 2, stk. 1, nr. 2, og stk. 2-5, sum koma í gildi 1. januar 2022."...

Undirritaði hevur yvirfyri bæði VØRN og Fiskimálaráðnum víst á, at allar lógir síðani 1994 hava havt ásetingar um, hvussu farast skal fram í sambandi við útskiftan av fiskiførum (flytan av veiðiloyvum), og at eingin áseting síðani 10. mars 1994 hevur stillað persónar og feløg verri enn frammanundan í samband við útskiftan av fiskifari, tvørturímóti.

Í lógini um vinnuligan fiskiskap frá 1994 var tað § 8 (upprunaliga § 8, stk. 2 og 3), sum reguleraði útskiftan av fiskifari í øllum skipabólkum. Hesar reglur hava eftir tørvi verið broyttar í fleiri umførum, og við løgtingslóg nr. 38 frá 26. mars 2002 varð skipanin fyri útskiftan av fiskiførum í bólk 5 broytt.

Hereftir skuldu bólkur 5 virka undir eini skipan (bert) við fiskiloyvum. Í viðmerkingum til broytingina legði Løgtingið tó dent á, at fiskiloyvini frameftir skuldu hava sama status sum veiði- og fiskiloyvi hjá øðrum skipabólkum...

Í hesum sambandi kann eisini vísast á LUM mál nr.: 200100004, s. 16. Her staðfestir Fiskimálaráðið at fiskiloyvi, viðvíkur sjálvum fiskirættindunum og er knýtt at tí einstaka persóninum / felagnum, men sum er óheft av tí einstaka fiskifarinum.

Í galdandi lóg verður í viðmerkingunum (LM-15/2019 s. 39) sagt soleiðis, citat:

> Grundsjónarmiðið hevur í nógv ár verið, at lógarkarmarnir fyri fyrisiting av rættindunum hjá smábátum eiga at vera øðrvísi enn hjá størru skipunum, serliga tí at vinnuligu og rakstrarligu fyritreytirnar hjá smæstu útróðrarbátunum eru øðrvísi. Hetta sjónarmið er eisini grundarlagið undir ásetingunum á økinum í hesum lógaruppskoti. Fyri smærru bátarnar er ikki krav um veiðiloyvi. Bátarnir skulu bert hava fiskiloyvi, sum í ávísan mun fær líknandi støðu sum veiðiloyvi.
>
> Eftir uppskotinum kann rættindahavari flyta síni rættindi á annan bát, tá bátur verður skiftur út, t.v.s.,at rættindi ikki skifta hendur. Treyt er, at fiskiorkan ikki verður størri. Rættindahavari kann somuleiðis selja bát og lata veiðirættindini fylgja við bátinum.

Kunngerðir á økinum
Síðani 1996 hava fleiri kunngerðir um treytir fyri fiskiloyvi í bólki 5 verið galdandi.

Kunngerð nr. 109 frá 25. juli 1996 var fyrsta kunngerðin á økinum. § 1, stk. 2 ásetti citat:

> Um ein persónur, sum lýkur inntøkutreytirnar sambært § 1, stk. 1, punkt b) keypir ein útróðrarbát undir 15 BRT, sum hevur veiðuloyvi, og sum lýkur treytirnar í § 1, stk. 1, punkt a), fær hann útskrivað fiskiloyvi til fult riknan útróðrarbát, um seljarin av nevnda báti fráskrivar sær vunnin rættindi til fiskiloyvi við øðrum báti og avhendar rættindini til keyparan. ...

Kunngerð nr. 27 frá 27. februar 2003 var onnur kunngerðin á økinum. § 1, stk. 2 ásetti:

> Um ein persónur, sum lýkur inntøkutreytirnar sambært § 1, stk. 1, litra b) keypir ein útróðrarbát undir 15 tons, sum hevur fiskiloyvi, og sum lýkur treytirnar í § 1, stk. 1, litra a) fær hann, eftir umsókn, útskrivað fiskiloyvi til fult riknan útróðrarbát 5A. ...

Kunngerð nr. 105 frá 14 sept. 2005 var triðja kunngerðin á økinum. § 1, stk. 3 ásetti:

> Fiskiloyvi kann útskrivast til útróðrarbátar undir 15 tons, um báturin, eftir umsókn, hevur fingið játtað loyvi at flyta fiskiloyvi av øðrum báti**.** Eigarin av hesum báti skal skrivliga vátta, at báturin hevur avhendað sítt fiskiloyvi til nýggja eigaran, og hevur góðtikið ræðisavmarking, har øll fiskirættindi verða tikin av bátinum.

Kunngerð nr. 86 frá 14. juni 2011 var fjórða kunngerðin á økinum. Í hesi kunngerð var eingin ásetan um flytan yvirhøvur, men § 3 ásetti:

> Fiskiloyvi 5A kann, eftir umsókn, eina ferð um árið, verða útskrivað eigara av fullriknum fiskifari í høvuðsbólki 5, um eigarin lýkur treytirnar í § 2 í hesi kunngerð, og um fiskifarið, álmanakkaárið fyri, hevur avreitt fyri minst kr. 400.000,-, tó undantikið virði av sild, makreli, brislingi, høgguslokki og gággu.

Kunngerð nr. 174 frá 21. dec. 2018 var fimta kunngerð á økinum. § 2, stk. 5 ásetti:

> Um ein persónur, sum lýkur treytirnar sambært stk. 1, nr. 2, keypir ein bát í bólki 5, ið lýkur treytirnar í stk. 1, nr. 1, kann hesin, eftir umsókn, fáa skrivað eitt fiskiloyvi 5A.

Kunngerð nr. 76 frá 22. maj. 2019 var sætta kunngerðin á økinum. § 2, stk. 5 ásetti:

> Um ein persónur, sum lýkur treytirnar sambært stk. 1, nr. 2, keypir ein bát í bólki 5, ið lýkur treytirnar í stk. 1, nr. 1, kann hesin, eftir umsókn, fáa skrivað eitt fiskiloyvi 5A.

Kunngerð nr. 217 frá 22. des. 2020. Broytingin í kunngerð nr. 76 frá 22. maj 2019. Sum fyrr er víst á, so var endamálið við broytingini eksplisitt at: *"Útseta gildiskomuna fyri treytini um mark fyri lønarinntøku"* (mín undirstriking) og ikki broyting í treytunum fyri útskiftan av fiskifari.

Við avgerðini í hesum máli stillar myndugleikin skipaeigarar í bólki 5 - eisini teir, sum burturav hava fiskivinnu sum vinnuveg og inntøkugrundarlag - verri enn skipaeigarar í øðrum skipabólkum, tá ið fiskifør verða skift út.

Í skrivi til VØRN dagfest 24 februar 2024 gjørdi undirritaði m.a. vart við:

> Fyri tað um § 2, stk. 5 er farin úr gildi, so er tað at fáa sær nýggjan bát ikki dottið burtur. Sum sjófeingislógin er skipað, so ber ikki til at nokta einum rættindahavara at fáa sær nýggjan bát, fyri tað um kunngerðin ikki hevur eina áseting, sum snýr seg um 'sama eigara, nýggjur bátur' – tí kann tað bara vera ein spurningur, um umsøkjarin skal hava A- ella B-fiskiloyvi útskrivað. At niðurstiga meg frá A- til B-fiski-loyvi ger støðu mína verri, og tað krevur eina greiða heimild.
>
> Tað er vanligt at skifta bát út, og eftirsum § 2, stk. 1, nr. 1 einans snýr seg um 'sama eigara, sama bát', so er tað ein mangul í regluverkinum, at eingin áseting finst um 'sama eigari, annar bátur'. T.v.s., at sjálvt um § 2, stk. 1, nr. 1 stendur einsamøll eftir, so ber ikki til at grunda eina avgerð á orðingina í teirri ásetingini í einum tilfeldi, ið viðvíkur einum nýggjum báti.
>
> Eg fái at vita, at um eitt tilfeldi í einum føri sum hesum ikki er dekkað í reglunum, men eigur at vera tað, so eigur VØRN at brúka 'útfylling' og 'tulking' fyri at koma fram til eina haldbara avgerð í málum um 'sami eigari, annar bátur'.
>
> Hesir, sum eg havi spurt, óheftir hvør av øðrum, siga ta sama: eftirsum tað er vanligt í bransjuni at skifta bátin út, so átti VØRN at brúkt tað, teir kallaðu 'forholdets natur' og viðgera bátin sum tað, hann er, nevniliga ein bátur, ið lýkur krøvini, men bara ein annar enn tann undanfarni.

Einki av hesum hesum hava myndugleikarnir, VØRN og Fiskimálaráðið, vilja fyrihildið seg til. Niðurstøðan hjá Fiskimálaráðnum av klaguni er eitt avrit av niðurstøðuni hjá VØRN ... *(sí avgerðina frá Vørn, mín viðm.)*

Fiskimálaráðið endar við at føra fram: ...

> Viðmerkjast skal at enda við:
>
> 1) at Ráðið hevur kunnleika til tær avleiðingar, sum eru í sambandi við at skifta fiskifar út,
> 2) tí treytirnar um avreiðingarvirðið í tíð eru knýttar til bæði eigaran og fiskifarið, tað vil siga at eigarin skal lúka treytina um avreiðingarvirðið við sama fiskifari.
> 3) tað hevur tó verið soleiðis í mong ár, og Vørn hevur brúkt oman fyri nevndu áseting, bæði í førum, tá eigari fær fiskiloyvi til sama bát, og tá eigari skiftir fiskifar út.
> 4) um hetta skal broytast, krevur tað eina grundleggjandi broyting av skipanini, og ikki bert eina broyting í teimum førum, tá fiskifar verður skift út.
> 5) tað, sum er komið fram í hesum máli, verður tó tikið við í framtíðararbeiðið við at endurskoða kunngerðina.

Til hetta er at viðmerkja:

1) Ráðið sigur einki um, hví § 2, stk. 5 varð strikað! Endamálið við broytingini var "útset- an av gildiskomuna fyri treytini um mark fyri lønarinntøku"
   Ráðið sigur einki um, hvørt tað var ráðsins uppruna tilætlan, at § 2, stk. 1, nr. 1 (sami persónur/felag, sama skip), skuldi setast ístaðin fyri strikaðu § 2, stk. 5 (sami persón- ur/felag, annað skip)
   Ráðið sigur einki um, nær og hvussu tey fingu kunnleikin um broyttu rættarstøðuna, eftir at farið varð undir at brúka § 2, stk. 1, nr. 1 sum rættarregul í samband við § 2, stk. 5 støður
2) Ráðið heldur uppá, "at treytirnar um avreiðingarvirðið í tíð eru knýttar til bæði eigaran og fiskifarið". Hetta uppáhald gevur bert meining í teirri løtu, at myndugleikin velur at brúka § 2, stk. 1, nr. 1 (sami persónur/felag, sama fiskifar) sum rættarregul í einum støðu, har fyritreytin er útskiftan av fiskifari (sami persónur/felag, annað fiskifar)
3) Ráðið staðfestir, at soleiðis hevur verið fyrisitið í áravís. Ráðið sigur einki hvussu ein møgulig heimildarleys fyrisitan - har løgtingssins vilji og harvið rættartrygdin hjá borgarum møguliga er sett til viks - skal viðgerðast.
4) Tann 22. dec. 2020 gjørdust § 2 stk. 5-støður brádlig til § 2, stk. 1, nr. 1-støður. Hetta var ein kollveltan av skipanini um útskiftan av fiskiførum.
   Ráðsins uppáhald um, at tað at venda venda aftur til uppruna fyrisitanina krevur grundleggjandi broytingar í skipani, gevur onga meining.
   Antin verður ein nýggj § 2, stk. 5 innsett í kunngerðina ella viðgerð myndugleikin støðuna eins og líknandi støður fyri útskiftan *av fiskifari* í øðrum skipabólkum.
   Útskiftan av fiskifari er ikki fevnt av reglunum í núverandi kunngerð, men eigur at vera tað, og í slíkum førum eigur myndugleikin at brúka 'útfylling' og 'tulking' fyri at koma fram til eina haldbara avgerð í einum máli um útskiftan av fiskifari.

5) Ein kunngerð skal ikki bert hava heimild í lóg, innihaldsliga skal hon eisini vera í sam- svari við lóg. Spurningurin er, hvussu grundgevur Fiskimálaráðið fyri:
   - at endamálið við kunngerðini eftir 22. dec 2020 var at útvega eina nýggja heimild til landsstýrismannin?
   - at nýggja heimildin fevndi um niðurstigan av fyrr lógliga flokkaðaum A-virksemið hjá persónum og feløgum - við útróðuri sum høvuðsvinnuveg og einasta inntøku- grundarlag - til B-virksemið?

Ein endurskoðan av kunngerðini eigur sum ein sjálvfylgja fyrst og fremst at tryggja, at samsvar er millum lóg og kunngerð, og at samsvar er millum endamálið við kunn-gerðini og tað, sum myndugleikin regulerar við heimild í kunngerðini.

Niðurløga
Útgangsstøðið fyri klaguni til Fiskimálaráðið var, at vit ikki mettu, at VØRN sum myndugleiki á økinum tóktist verða áhugað í at greina rættarstøðuna og harvið veita trygd fyri, at Løgtingsins vilji varð framdur og rættartrygdin hjá mær sum borgara var óskalað.

Fyri okkum var tað tí ikki minni undrunarsamt, at Fiskimálaráðið uttan yvirhøvur at gera nakra greining av lógargrundarlagnum bert endurgevur tað, sum VØRN hevur ført fram, og staðfestir avgerðina hjá VØRN...

Fiskimálaráðið hevur givið VØRN viðhald. Ráðið hevur bara staðfest avgerðina hjá VØRN við at endurgeva sjónarmiðini hjá VØRN uttan gjøllari viðgerð, og Fiskimálaráðið ger í sínum svari onga roynd at royna tær grundgevingar, sum vit hava ført fram til frama fyri okkara sjónarmiði.

Tí verður henda klaga send Løgtingsins Umboðsmanni. “

## 4. Viðmerkingar frá myndugleika og klagara

Tann 8. juli 2024 varð klagan send Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum til ummælis. Samstundis varð ráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum.

Tann 21. august 2024 sendi ráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

“ ...
Málslýsing
... *(sí avgerð frá ráðnum undir punkt 2, mín viðm.)*

Skipanin við fiskiloyvum 5 A og 5 B
Fyri at geva eina betri lýsing av málinum, skal skipanin við A- og B-fiskiloyvum fyrst lýsast.

Bólkur 5 í fiskidagaskipanini fevnir um útróðrarbátar undir 15 tons sambært § 18, stk. 1, nr. 5 í sjófeingislógini (LL nr. 152 frá 2019 um sjófeingi).

Rætturin til fiskidagar er latin teimum persónum og feløgum, sum í 2019 høvdu rættindini í hesum bólki ella, sum rættindini seinni eru latin til, sambært § 18, stk. 2 í sjófeingislógini.

Talan er um ein ávísan skara av útróðrarbátum undir 15 tons, sum rættindi til fiskiloyvi í bólki 5 eru knýtt at.

Viðmerkjast skal, at sambært § 4, stk. 2 í sjófeingislógini krevst onki veiðiloyvi til fiskifør í bólki 5, sum bert hava eitt fiskiloyvi við fiskidøgum, sum í ávísan mun virkar sum eitt veiðiloyvi.

Talið av bátum, sum hava rætt til at fáa fiskiloyvi í bólki 5 í fiskidagaskipanini, er rættiliga stórt. Í t.d. 2023 vóru 594 fiskiloyvi útskrivað í bólki 5.

Hesir bátar, sum hava fiskiloyvi til rættindi í bólki 5, eru síðani býttir upp í tveir bólkar, bólk A og bólk B. Við øðrum orðum eru tvey sløg av fiskiloyvum í bólkinum. Ávísar treytir skulu vera loknar fyri at fáa fiskiloyvi 5 A. Teir, sum ikki lúkar hesar treytir, fáa fiskiloyvi 5 B.

Endamálið við treytunum og at býta bólkin í A og B er at áseta eitt ávíst fiskidagatal til hvønn bólkin og harvið tryggja eitt ávíst dagatal til bólk A – teir sokallaðu "fullriknu" bátarnir, sum í størri mun liva av útróðri enn teir í bólki B, sum hava tað sum ítriv at rógva út.

Sambært § 4 í kunngerð nr. 76 frá 2019 verða dagarnir til bólk A ásettir soleiðis: talið av bátum í bólki A x 110, tó í mesta lagi 60% av øllum døgunum, sum eru ásettir fyri bólk 5. Tað, sum eftir er av døgum, verður latið bólki B.
Útrokningin vísir eisini, at tað upprunaliga hevur verið mett, at 110 dagar sum útgangsstøði skulu vera til hvønn bát í bólki A.

Einasti munur á bólki A og B er dagatalið, sum er ásett til hvønn bólkin, har bólkur A hevur rætt til størsta partin av døgunum, meðan bólkur B hevur rætt til restina. Bólkarnir virka annars undir somu treytum. Fiskidagarnir eru felags, tað vil siga, at teir kunnu fiska til dagarnir, ið eru ásettir til teirra bólk, eru uppi.

Leggjast kann afturat, at sum støðan er nú við smáum fiskastovnum, er nóg mikið av døgum til báðar bólkarnar og allar aktørar í bólkunum.

Viðvíkjandi viðmerking klagarans um, at hansara virksemi verður niðurstigað við einum fiskiloyvi 5 B, skal Ráðið longu nú upplýsa, at í veruleikanum er eingin munur fyri hann, um hann hevur fiskiloyvi 5 A ella 5 B, tí hann hevur nóg mikið av døgum óansæð. Og soleiðis fer støðan mest sannlíkt at vera, til hann aftur lýkur treytirnar og fær eitt A-loyvi.

Lógargrundarlagið
Lógargrundarlagið fyri skipan av fiskiskapinum hjá fiskiførum undir føroyskum flaggi í føroyskum sjógvi eru ásetingarnar í kapitli 5 (§§ 18-22) í sjófeingislógini.

Sum nevnt omanfyri, og sum ásett í § 18, stk. 1, nr. 5 í sjófeingislógini, fevnir bólkur 5 í fiskidagaskipanini um útróðrarbátar undir 15 tons.

Um bólk 5 er soleiðis ásett í § 19, stk. 2 í sjófeingislógini:
Stk. 2. Fyri bólk 5, sambært § 18, stk. 1, ásetir landsstýrismaðurin nærri treytir fyri at fáa fiskiloyvi, umframt reglur um, hvussu ásetta fiskidagatalið hjá bólkinum verður brúkt og býtt millum fullriknar og ikki fullriknar útróðrarbátar, hvør er at meta sum fullrikin og ikki fullrikin útróðrarbátur, og reglur um inntøkumørk og veiðinøgdir.

Við heimild í § 19, stk. 2 hevur landsstýrismaðurin í kunngerð nr. 76 frá 2019 ásett treytir fyri fiskiloyvi 5 A og 5 B og reglur um býtið av fiskidagatalinum hjá bólki 5, útróðrarbátar undir 15 tons.

Í verandi skipan skal treytin í § 2, stk. 1, nr. 1 í kunngerð nr. 76 frá 2019 vera lokin, fyri at fiskiloyvi 5 A kann útskrivast. Sum nevnt omanfyri, ljóðar ásetingin soleiðis:

§ 2. Fiskiloyvi 5 A kann eftir umsókn verða skrivað eigara av fult riknum fiskifari í bólki 5:
1) um eigarin við fiskifarinum, næstseinasta álmanakkaárið fyri umsóknarárið, hevur avreitt fyri minst kr. 200.000, og sum tað framgongur í kunngerðini, eru fleiri treytir ásettar í § 2, men sambært § 5, stk. 3 í kunngerðini eru § 2, stk. 1, nr. 2 og stk. 2-5 ikki galdandi fyrr enn 1. januar 2025. Sum støðan er nú, er tað sostatt bara § 2, stk. 1, nr. 1, ið er galdandi. Nærri verður greitt frá hesum niðanfyri í sambandi við gongdina við kunngerðini.

Gongdin við kunngerðini
Í nógv ár var fiskiloyvi 5 A treytað av, at avreitt var fyri í minsta lagi 400.000 kr. árið frammanundan. Sí til dømis § 3 í kunngerð nr. 85 frá 2011...

Eftir ynski frá eigarum av snellubátum var kravið um avreiðingarvirði lækkað frá 400.000 kr. niður í 200.000 kr. Henda broyting kom inn í 2019 við kunngerð nr. 174 frá 2018, og hevði gildi frá 1. januar 2019.

Sum nevnt omanfyri, er endamálið við at býta bólkin upp í A og B at tryggja eitt ávíst fiskidagatal til teir fullriknu bátarnar, sum í størri mun liva av útróðri enn teir, sum hava tað sum ítriv at rógva út, og fyri at avmarka skaran av fiskiførum, sum kundu fáa A-loyvi, var ætlanin tískil eisini at seta inn treyt um mark fyri aðrari inntøku enn frá útróðri.

Inntøkumarkið bar tó ikki til at umsita, og gildiskoman fyri treytina um inntøkumark – og allar ásetingar viðkomandi hesum – varð tí útsett fleiri ferðir, og hóskandi loysn er enn ikki funnin.

Støðan er tí, at sum nú er, er tað bert kravið um avreiðingarvirði á minst 200.000 kr. næstseinasta álmanakkaárið fyri umsóknarárið, sum er galdandi.

Talið av fiskiførum við fiskiloyvi 5 A hevur fyrr ligið millum 20-40 hvørt ár, men við einum kravi um avreiðingarvirði á 200.000 kr., fór talið upp á gott 90 fiskifør.
Hetta hevur við sær, at kemur fiskur aftur, og allir bátar fara á flot, eru bátar við A-loyvi ikki tryggjaðir nøktandi tal av fiskidøgum.

Ráðið hevur í fleiri umførum arbeitt við at finna eina haldbara loysn á økinum, men er enn ikki komið á mál.

Nú er arbeiðsbólkur settur, og arbeiðið skal eftir ætlan gerast í ár, so nýggj kunngerð kemur í gildi frá 1. januar 2025.

Trupulleikin við, at treytin fyri A-loyvi ikki kann lúkast, tá fiskifar verður skift út, hevur ikki verið partur av arbeiðinum við kunngerðini, sum higartil hevur verið, men er nú eisini settur á skrá.

Leggjast kann afturat, at trupulleikin er vorðin størri, síðani at næstseinasta álmanakkaárið fyri umsóknarárið er vorðið avgerandi fyri treytina um avreiðingarvirðið, tí nú skulu tvey ár ganga, áðrenn kravið kann lúkast.

Fyrr var avreiðingarvirðið árið fyri umsóknarárið avgerandi, og tá var bert talan um eitt ár, har rættindahavarar máttu hava B-loyvi, áðrenn treytin um A-loyvi aftur var lokin.

Viðmerkingar Ráðsins
Sum longu nevnt er spurningurin í málinum, um grundarlag var at útskriva fiskiloyvi 5 A til klagaran.

Sambært § 2, stk. 1, nr. 1 í kunngerð nr. 76 frá 2019 skal sum kunnugt vera avreitt fyri í minsta lagi 200.000 kr. við fiskifarinum.

Vørn umsitur hetta soleiðis, at avreitt skal vera við sama fiskifari/ávísa fiskifari. Tað vil siga, at um rættindahavarin skiftir fiskifarið út, er ikki longur talan um sama fiskifarið, og treytin er ikki lokin.

Viðvíkjandi hesum hevur ásetingin verið óbroytt í mong ár, og siðvenjan/praksis hjá Vørn hevur eisini verið tann sama.

Vísast kann til dømis til ásetingina í § 1, stk. 1, litra a í áður galdandi kunngerð 27 frá 2003. Í ásetingini ljóðar, at fiskiloyvi 5 A verður útskrivað eigara av fult riknum fiskifari, “um eigarin við fiskifarinum” árið fyri hevur avreitt fyri eitt víst.

Líknandi orðingar síggjast í tilsvarandi ásetingum í áður galdandi kunngerðum, til dømis í kunngerð nr. 105 og nr. 86 frá ávikavist 2005 og 2011.

Hóast onkrar broytingar hava verið gjøgnum árini í sjálvum treytunum fyri at fáa útskrivað fiskiloyvi 5 A, eru orðingarnar í ásetingunum í stóran mun tær somu.

Tað hevur í mong ár verið eigarin við sama/ávísa fiskifari, sum hevur verið avgerandi fyri, um treytirnar fyri at fáa útskrivað fiskiloyvi 5 A eru loknar.

Siðvenjan hjá Vørn er ikki beinleiðis í ósamsvari við lógina. Vísast skal eisini aftur til heimildina fyri kunngerðini í § 19, stk. 2 í sjófeingislógini, sum er endurgivin omanfyri í sambandi við lógargrundarlagið.

Ráðið metir, at spurningurin hinvegin er, um tað er sakligt at krevja, at treytin um avreiðingarvirðið skal vera lokin fyri sama/ávísa fiskifarið. Hetta er helst meira ivasamt.

Rættindi verða latin persóni ella felagi og síðani knýtt at fiskifari. Fiskifarið er bert eitt “aktiv”, sum klagarin eisini vísir á, og tað eigur ikki at vera so avgerandi, hvørjum fiskifari, avreitt er við, á tann hátt sum siðvenja er fyri á hesum øki.

Ásetingin kundi møguliga rúma aðrari siðvenju.

Tað er undir øllum umstøðum eyðsæð, at støðan ikki er nøktandi. Ráðið umhugsaði eisini at finna aðra loysn í hesum máli. Tað er tó trupult at gjøgnumskoða eina haldbara og varandi loysn, sum tekur atlit at øllum viðurskiftum innan fyri so stutta tíð.

Hetta, saman við tí støðu, at tað ikki hevur veruligar avleiðingar fyri klagaran at hava eitt fiskiloyvi 5 B, til hann aftur lýkur treytina um eitt fiskiloyvi 5 A, førdi til, at Ráðið valdi at halda fast við verandi rættarstøðu. Tað varð eisini havt fyri eyga, at kunngerðin skal endurskoðast í næstum.
...

Viðmerkingar til klaguna
Vit meta, at flestu viðurskifti eru umrødd og viðgjørd omanfyri, og vit gera tí bert útgreinandi viðmerkingar til einstøk viðurskifti her, sum vit meta hava týdning fyri málið.

Viðvíkjandi viðmerkingum klagarans til § 2, stk. 1, nr. 1 og § 2, stk. 5 skal viðmerkjast, at § 2, stk. 1, nr. 1 er ásetingin, sum regulerar rættin at fáa fiskiloyvi 5 A.

Ein serregla fyri at útskifta fiskifar hevur verið í kunngerðini í teimum tíðarskeiðum, tá eitt inntøkumark eisini hevur verið knýtt at rættinum til A-loyvi.

Hetta sæst t.d. í § 1, stk. 2 í áður galdandi kunngerð nr. 109 frá 1996 og somuleiðis í § 1, stk. 2 í kunngerð nr. 27 frá 2003. Hetta sæst eisini í galdandi kunngerð í § 2, stk. 5, men ásetingin er ikki í gildi, tí reglan er knýtt at inntøkumarkinum í § 2, stk. 1, nr. 2, sum ikki er í gildi. Reglan í stk. 5 kann tí ikki virka.

Hetta er samstundis svar til spurning klagarans um orsøkina til, at § 2, stk. 5 ikki er í gildi.

Fyri at útgreina nærri kann leggjast afturat, at tá markið fyri avreiðingarvirðinum bleiv sett niður til 200.000 kr., var ætlanin at seta inntøkumarkið inn fyri at tryggja, at skarin, sum hevur rætt til A-loyvi, hevur útróður sum týðandi inntøku.

Eftir at kunngerðin var komin í gildi, gjørdi Vørn vart við, at inntøkumarkið var trupult at umsita og kravdi nógva orku. Harafturat var tað ein avbjóðing, at fiskiárið nú fylgir

álmanakkaárinum, og ikki longur gongur frá september til august. Hetta hevur við sær, at inntøkan fyri árið frammanundan ikki er liðugt viðgjørd hjá TAKS, tá fiskiloyvini skulu útskrivast í byrjanini av januar. Hetta seinasta førdi til broytingina, at tað var inntøkuárið, sum var næstseinasta árið fyri umsóknarárið, sum var avgerandi fyri inntøkumarkinum og avreiðingarvirðinum.

Hendan treytin um "næstseinasta álmanakkaárið" hevur ongantíð verið nøktandi, tí nógv kann broytast innan fyri hetta tíðarskeiðið, og spurnartekn kann setast við, um tað er viðkomandi at hyggja at inntøkuni fyri næstseinasta álmanakkaárið fyri umsóknarárið, tá loyvið skal gevast.

Alt hetta førdi til, at inntøkumarkið bleiv útsett og harvið eisini reglan í § 2, stk. 5.

Viðvíkjandi § 2, stk. 5 skal tó gerast vart við, at henda áseting heldur ikki er nøktandi. Umframt at fevna um lønarinntøkuna, leggur hon eisini dent á fiskifarið, og í hesi áseting er greitt, at tað er ávísa fiskifarið, sum er avgerandi.

Tað vil siga, at um ein persónur skiftir fiskifarið út, og lýkur treytina um inntøkumarkið, so kann hann fáa eitt A-loyvi, um hann keypir eitt fiskifar, sum hevur A-loyvi. Hetta førir samstundis til, at um hann hinvegin keypir eitt fiskifar við B-loyvi, so fær hann ikki eitt A-loyvi, hóast hann lýkur treytirnar um inntøkumarkið, og hevur havt eitt A-loyvi frammanundan. Tað er í grundini ikki so stórur munur á § 2, stk. 1, nr. 1 og § 2, stk. 5 í so máta.

Hetta vísir eisini, at tað er ikki so einfalt at finna eina varandi og haldbara loysn, sum virkar rætt og rímiligt undir øllum umstøðum. Hetta krevur eina heildarviðgerð av kunngerðini, og hetta var sum sagt eisini orsøkin til, at Ráðið ikki vildi gera eina loysn í hesum einstaka føri.

Atlit má eisini takast til spurningin um fiskiorku. Orsøkin til at skifta fiskifar út er ofta ynski um at fara til eitt størri fiskifar. Kravið um, at fiskiorkan ikki má økjast hevur tó við sær, at rættindahavarar ikki uttan víðari kunnu skifta fiskifør út við eitt størri fiskifar. Ein loysn má eisini finnast viðvíkjandi hesum, tá ein nýggj skipan skal gerast

Leggjast skal afturat, at Vørn hevði bert § 2, stk. 1, nr. 1 at halda seg til, og við tí siðvenju, sum Vørn hevur á økinum, og sum eisini er lýst nærri omanfyri, bar ikki til hjá Vørn at koma til aðra niðurstøðu.

Ráðið hevur størri rásarúm, tí heimildarásetingin í lógini er víð, men Ráðið kundi ikki yvirskoða at finna eina nøktandi loysn innan so stutta tíð, sum ein kæruviðgerð tekur, og tá hetta í grundini ongan týdning hevur fyri, hvussu klagarin kann virka, tí nóg mikið av døgum eru til allar aktørarar óansæð loyvisslag, og kunngerðin er sett á skrá at verða endurskoðað, valdi Ráðið at halda fast við avgerðina hjá Vørn. Avgerðin hjá Ráðnum endurspeglar tó ikki hetta, og tað harmast vit um."

Við skrivi, dagfest 29. august 2024, fekk klagarin frágreiðingina frá ráðnum til viðmerkingar.

Tann 12. september 2024 sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> “...
> Tað er Fiskimálaráðið, sum smíðar kunngerðir og er kærumyndugleiki, og í hesum føri VØRN... sum umsitur...
>
> Undirritaði gongur út frá, at Fiskimálaráðið, eins og hvør annar myndugleiki, sum smíðar kunngerðir, hevur meginreglur og mannagongdir at halda seg til, m.a. hetta at kunngerðir ikki bert skulu hava heimild í lóg, men eisini innihaldsliga skulu vera í samsvari við lóg.
>
> Og hetta, at tá ið myndugleikin ger munandi inntriv (t.d. niðurstigar lógligt A-virksemi hjá borgara) við støði í kunngerð, at hann so kann vísa til greiða lógarheimild fyri hesum inn trivum.
> ...
>
> Tað er eingin lógarheimild fyri at knýta útskiftan av fiskifari til skipanina við A og B fiskiloyvum og tað fara eg at grundgeva fyri og skjalprógva í hesum skrivi.
>
> Skipanin við fult riknum útróðrarbátum
> Rættindahavar í bólki 5... hava síðani 10. mars. 1994 verið í eini serstøðu, sum hevur sín uppruna í § LVF § 29, stk. 1, nr. 4 og 5. Fyri rættindahavar í bólkunum 1, 2 og 3 blivu felagskvoturnar... § 28 býttar í eginkvotur § 29, men ikki fyri bólkarnar 4 og 5.
>
> Stóra talið av rættindahavum í bólki 4 og 5 í 1994, sum høvdu rætt at fiska av lutfalsliga smáum heildar- og felagskvotum (§§ 27 og 28), viðførdi, at løgtingið longu í upprunalóg ini frá 1994 útvegaði landsstýrismanninum ávísa serstaka heimild í § 9, stk. 1, nr. 2 við atliti at, hvussu felagskvotur hjá bólki 4 og 5 kundu gagnnýtast.
>
> Í sambandi við at ein fiskidagaskipan varð innførd í staðin fyri kvotaskipanina í 1996 blivu heimildirnar hjá landsstýrismanninum í grein 9... víðkaðar, og skipanin við fult riknum bátum bleiv knæsett í § 9, stk. 1, nr. 9.
>
>> § 9, stk. 1 Landsstýrinum verður heimilað í kunngerð at skipa fyri fiskiskapi hjá fiskiførum undir føroyskum og fremmandum flaggi á føroysku landleiðunum og fiskiskapi hjá fiskiførum undir føroyskum flaggi uttanfyri landleiðirnar og kann landsstýrið m.a. gera reglur um:
>>
>> ......
>>
>> nr. 9) Reglur um hvør er at meta sum fult rikin og ikki fult rikin útróðrarbátur og reglur um inntøku- mørk**.**
>
> Viðmerkingar Lt. 1995, s. 521, ad. 8
>
>> Greinin hevur til endamál at geva landsstýrismanninum tær neyðugu heimildirnar til tess at regulera fiskiskapin samsvarandi endamálinum í lógini. Tað er tí neyðugt at hava nærri reglur um fiskidagaskipan innan- og uttanfyri fiskidagaleiðina og reglur um hvussu fiskifør verða at rokna sum vinnuliga rikin og ikki.

Skipanin hevur óbroytt verið knýtt at heimildum hjá landsstýrismanninum at áseta reglur um avreiðingarvirði og inntøkumørk, tvs. at virksemi hjá rættindahava ella bátsformanni í samband við driftina.

Avhending og flyting av loyvum
... Í galdandi lóg verður henda skipan umsitin samsvarandi grein 32 í kap. 8.... Av almennu viðmerkingunum til § 32 og av serstøku viðmerkingunum til § 32, stk. 2 framgongur m.a., citat:

> Hendan greinin ásetir serstakar reglur um, hvussu rættindi hjá útróðrarbátum í bólki 5 í fiskidagaskipanini kunnu flytast ella skifta hendur. Í sambandi við flyting og avhending av rættindum fær fiskiloyvið hjá hesum bátum líknandi støðu sum veiðiloyvi...
>
> Viðm. til stk. 2.: Rættindahavari kann við hesi áseting selja bát og lata veiðirættindini fylgja við bátinum. Tað, ið fylgir við slíkari sølu, er rætturin at fiska undir fiskidagaskipanini í bólki 5. Tað vil siga, at talan er ikki um rætt til t.d. fiskiloyvi 5A ella fiskiloyvi 5B...

...

Í sambandi við skipanina við A- og B-fiskiloyvum, so er vert at geva gætur, at síðani 1996 hevur eingin lógaráseting lagt upp til, at heimildin hjá landsstýrismanninum er víðkað til at fevna um annað enn gerð av reglum um avreiðingarvirði (og í ávísum føri inntøka frá øðrum virksemi).

Av viðmerkingunum til § 32, stk. 2. í galdandi lóg framgongur eksplisitt, at skipanin við A- og B-fiskiloyvum og skipanin við útskiftan av fiskifari eru ymiskar skipanir, sum einki hava við hvørja aðra at gera.

Hvussu Fiskimálaráðið - hóast greiðu viðmerkingarnar til § 32, stk. 2 - kemur til eina niðurstøðu um, at tað er heimilað og í samsvar við lógina at krøkja hesar skipanir saman, framstendur enn ósvarað.

...

Sum rættindahavi og driftari lýkur undirritaði allar tær treytir, sum framganga omanfyri fyri at fáa eitt A-fiskiloyvi útskrivað. Trupulleikin er sostatt ikki virksemið hjá undirritaða, men tann, at Fiskimálaráðið uttan tilvísan til lógina og beinleiðis í stríð við § 32, stk. 2 í galdandi lóg krøkir skipanina við útskiftan av fiskifari til skipanina við A og B fiskiloyvum.

§ 19, stk. 5
Uppruna ásetingin í Løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019, sum reguleraði skipanina

við fult og ikki fult riknum fiskiførum var § 19, stk. 5:

> 19, stk. 5. Fiskidagar, tillutaðir bólki 5 sambært stk. 1, verða latnir sum felags fiskidagar. Landsstýris- maðurin ásetir nærri reglur fyri, hvør er at meta sum fult rikin og ikki fult rikin útróðrarbátur, og reglur um inntøkumørk og veiðinøgdir, og hvussu ásetta fiskidagatalið hjá bólkinum verður brúkt og býtt millum fult riknar og ikki fult riknar útróðrarbátar.
>
> Viðmerking:
> Smærru útróðrarbátarnir (bólkur 5) fáa fiskidagar sum felags fiskidagar. Eins og í verandi lóg er heimilað landsstýrismanninum at gera nærri reglur fyri, hvør er at meta sum fult rikin og ikki fult rikin útróðarbátur, og reglur um inntøkumark og veiðinøgdir.
>
> Nýtt í hesum uppskoti er, at sagt verður neyvari, at landsstýrismaðurin kann gera reglur um, hvussu ásetta fiskidagatalið hjá bólkinum verður býtt millum fult riknu og ikki fult riknu útróðrarbátarnar. Endamálið við hesi áseting er at hava eina umsitingarliga smidliga skipan fyri, hvussu ásetta dagatalið í bólki 5 verður brúkt og býtt millum fult riknar og ikki fult riknar, sum m.a. leggur upp fyri, at driftin í bólkinum er rættiliga ymisk frá einum tíðarskeiði til annað, og eisini millum fiskiár.
>
> Í umsitingini av hesum verður dentur framhaldandi lagdur á, at eitt hóskandi fiskidagatal verður sett av til fult riknu útróðrarbátarnar í bólkinum.

Einki í hesi áseting broytti ella víðkaði heimildirnar hjá landsstýrismanninum í 2019 í samband við skipanina við fultriknum útróðrarbátum. Heimildirnar vóru neyvt tær somu sum í grein 9, stk. 1, nr. 9 í 1996...

Tað nýggja í 2019 lógini var hinvegin neyvlýsingin í viðmerkingunum í § 32, stk. 2 í sambandi við sølu av fiskifari í bólki 5 við veiðiloyvi ...

> Tað, ið fylgir við slíkari sølu, er rætturin at fiska undir fiskidagaskipanini í bólki 5. Tað vil siga, at talan er ikki um rætt til t.d. fiskiloyvi 5A ella fiskiloyvi 5B.

Nýggja grein 19, stk. 2
Við Løgtingslóg nr. 185 frá 18. desember 2020 bleiv § 19, stk. 5 umorðað og sett inn sum nýggj § 19, stk. 2. Hetta var gjørt samstundis sum skipanin við ásetingin av fiskidøgum varð broytt. Framyvir fóru fiskidagar at verða ásettir av landsstýrismanninum í kunngerð og ikki av løgtinginum við lóg:

> 19, stk. 2. Fyri bólk 5, sambært § 18, stk. 1, ásetir landsstýrismaðurin nærri treytir fyri at fáa fiskiloyvi, umframt reglur um, hvussu ásetta fiskidagatalið hjá bólkinum verður brúkt og býtt millum fullriknar og ikki fullriknar útróðrarbátar, hvør er at meta sum fullrikin og ikki fullrikin útróðrarbátur, og reglur um inntøkumørk og veiðinøgdir.
>
> Viðmerking:
> Eins og í galdandi lóg verður heimilað landsstýrismanninum at gera nærri reglur um, hvussu ásetta fiskidagatalið hjá smærru útróðrarbátunum (bólkur 5) verður brúkt og býtt

> millum fullriknar og ikki fullriknar bátar, og hvør er at meta sum fullrikin og ikki fullrikin útróðrarbátur.
>
> Sum nýggj áseting verður skotið upp at geva landsstýrismanninum heimild at áseta treytir fyri at fáa fiskiloyvi í bólki 5. ...

Her kundi ein viðkomandi spurningur verið: Hevur nýggja heimildin í § 19, stk. 2 nakað við skipanina við A og B fiskiloyvum at gera? Svarið er nei. Nýggja heimildin til landsstýrismannin hevði beinleiðis samband við eitt nýtt stk. 3 í § 5 í lógini, ásetingin sum reguleraði treytir fyri at fáa útskrivað veiðiloyvi...

Á síðu 5 førir Fiskimalaráðið fram:

> Ein serregla fyri at útskifta fiskifar hevur verið í kunngerðini í teimum tíðarskeiðum, tá eitt inntøkumark eisini hevur verið knýtt at rættinum til A-loyvi.

Hetta reisir spurningin: við hvørjari lógarheimild og við hvørjum endamáli er skipanin við útskiftan av fiskifari vorðið knýtt at skipanini við A og B fiskiloyvum?

Útskrivan av loyvum
Niðast á síðu 1 og ovast á síðu 2 førir Fiskimálaráðið fram:

> Ráðið skuldi taka støðu til, um grundarlag var at útskriva klagaranum eitt fiskiloyvi 5 A, og niðurstøðan hjá Ráðnum var, at í verandi skipan er eingin heimild at skriva klagaranum eitt fiskiloyvi 5 A.
>
> Ráðið staðfesti avgerðina vísandi til § 2, stk. 1, nr. 1 í kunngerðini og siðvenjuna hjá Vørn.

Allir rættindahavar í fiskidagaskipanini hava síðani 1994 havt ein rætt at veiða eins og allir rættindahavar í fiskidagaskipanini síðani 1994 hava havt eitt rættarkrav um fáa veiði- og fiskiloyvi útskrivað.

Men rætturin hjá rættindahava til veiði- og fiskiloyvi (§ 18, stk. 2) og rætturin at fáa veiði- og fiskiloyvi útskrivað (§§ 5 og 6) fevna um grundleggjandi ymisk viðurskifti. Útskrivan av loyvum er treytaður av, at einstaki rættindahavin lýkur tær treytir, sum lógin til eina og hvørja tíð ásetur fyri útskrivan av loyvum.

Í galdandi lóg skullu treytirnar í §§ 5 og 6 verða uppfyltar áðrenn myndugleikin kann útskrivað ávikavist veiði- og fiskiloyvi. Rætturin at fáa fiskiloyvi útskrivað eksplisitt reguleraður í § 6.

Eftir lógarbroytingina í 2020 fevnir § 19, stk. 2 nú um tvey grundleggjandi ymisk viðurskifti, ávikavist um:

1) reglur um rætt til fiskiloyvi (góðkenning av sjálvum fiskifarinum við atliti at § 5 í galdandi lóg), og

2) reglur um virksemi A og B fiskiloyvi (avreiðingarvirði og inntøkumørk)

Skipanin við útskiftan av fiskifari verður regulerað í § 32 og kann ikki lógliga samantvinnast við skipanina um rættin til A- ella B-fiskiloyvi í § 19, stk. 2

Ein tulking av § 2, stk. 1, nr. 1 í kunngerðini, sum inndregur útskiftan fiskifari sum lógargrundarlag fyri niðurstigan av lógligum A-virksemi, er bæði óviðkomandi og óheimilað.

Um siðvenjur
Tað er eitt væl kent fyribrigdi, at óskrivaðar reglur, ið verða praktiseraðar yvir tíð, skapa siðvenjur, sum í ávísan mun kunnu síðustillast við aðrar rættarkeldur. Undirritaði hevur so ikki – fyrr enn nú - havt tørv á at seta seg inn í siðvenjuna á økinum.

Men hvussu er so við siðvenjum í almennari fyrisiting, sum hava sín uppruna í heimildaleysari fyrisitan – hvar stillar tað ein borgara? Hetta fara vit at lata upp til Umboðsmannin at taka støðu til.

...

At enda: Fiskimálaráðið tykist bagatellisera støðuna og førir fram:

> Leggjast kann afturat, at sum støðan er nú við smáum fiskastovnum, er nóg mikið av døgum til báðar bólkarnar og allar aktørar í bólkunum.
>
> Viðvíkjandi viðmerking klagarans um, at hansara virksemi verður niðurstigað við einum fiskiloyvi 5 B, skal Ráðið longu nú upplýsa, at í veruleikanum er eingin munur fyri hann, um hann hevur fiskiloyvi 5 A ella 5 B, tí hann hevur nóg mikið av døgum óansæð. Og soleiðis fer støðan mest sannlíkt at vera, til hann aftur lýkur treytirnar og fær eitt A-loyvi.

Til hetta er at viðmerkja: Hetta er ein margháttlig viðmerking frá einum almennum fyri sitingarmyndugleika! Eg skilji ikki rættuliga, hvat metingar og meiningar í Fiskimálaráðnum um brúk av fiskidøgum hevur við mína rættarstøðu sum rættindahavi at gera... “

Við skrivi, dagfest 16. september 2024, vórðu viðmerkingarnar hjá klagaranum sendar Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum til viðmerkingar við einari freist áljóðandi 3 vikur.

Tann 16. oktober 2024 sendi Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

“...
Vit skilja viðmerkingar klagarans soleiðis, at tær í høvðusheitum viðvíkja heimildunum á økinum.

Yvirskipað um fiskiloyvir til bólk 5

Heimildin at skipa fiskiskapin fyri bólk 5 er í §§ 18 og 19 í sjófeingislógini.
Rætturin til fiskiskap í bólki 5 er hjá teimum, sum høvdu rætt í 2019, ella sum rætturin seinni er fluttur til, sambært § 18, stk. 2 í sjófeingislógini.

Fiskiloyvir til fiskiskap í bólki 5 verða latin eigara av fiskifari (persóni ella felagi), og loyvini verða síðani knýtt at einum ávísum fiskifari. Tá tey eru knýtt at einum fiskifari, kunnu tey bert avhendast og flytast sambært reglunum í § 32 í sjófeingislógini.

Fiskiloyvir til fiskiskap í bólki 5 virka eisini sum veiðiloyvir, tvs. tey eru ein góðkenning av fiskifarinum og ein rættur at virka í vinnuni, samstundis sum tey geva fiskirættindi.

Samstundis eru reglurnar um A- og B-loyvini galdandi. Hesar reglur snúgva seg ikki um rættin at veiða, men tær snúgva seg um hvørji fiskifør eru at meta sum fullrikin og ikki fullrikin, og býtið av døgum í bólki 5 millum fullrikin og ikki fullrikin fiskifør.

Viðvíkjandi tí ítøkiliga málinum skal viðmerkjast, at klagarin selur eitt fiskifar við fiskiloyvi til fiskiskap í bólki 5, og keypir síðani eitt annað fiskifar við tílíkum fiskiloyvi. Hetta er alt farið fram sambært reglunum í § 32 í sjófeingislógini. Hervið hevur hann fiskiloyvi til fiskiskap í bólki. Málið snýr seg tí ikki um hansara rætt at veiða, men hinvegin um báturin er fullrikin ella ikki, og harvið hvørja pulju av døgum, hann hevur rætt til at fáa dagar úr, A ella B.

Rætturin til fiskiloyvi og til at avhenda og flyta fiskiloyvi er sostatt ikki knýtt at reglunum um A- og B-loyvir um fullriknar og ikki fullriknar bátar.
Tað er hinvegin A- og B-loyvini, sum eru knýtt at tí ávísa persóninum og tí ávísa bátinum.

Spurningurin er, hvørjar treytir kunnu setast sambært heimildini.

Heimildin at skipa fiskiskapin fyri fullriknar og ikki fullriknar útróðrarbátar (A- og B-loyvir)
Viðvíkjandi A- og B-loyvum er heimildin nágreiniliga í § 19, stk. 2.
Hon kom fyrstu ferð í lógina um vinnuligan fiskiskap við løgtingslóg nr. 50 frá 1996, og hon var orðað soleiðis: (samtykta orðingin var tann sama, sum orðingin í uppskotinum)

> § 9. Landsstýrinum verður heimilað í kunngerð at skipa fyri fiskiskapi hjá fiskiførum undir føroyskum og fremmandum flaggi á føroysku landleiðunum og fiskiskapi hjá fiskiførum undir føroyskum flaggi uttanfyri landleiðirnar og kann landstýrismaðurin m.a. gera reglur um:
> ...
> Nr. 9) Reglur um hvør er at meta sum fult rikin og ikki fult rikin útróðrarbátur og reglur um inntøkumørk.

Onkrar smávegis broytingar vóru í § 9, stk. 1, 1. pkt., men nr. 9 var óbroytt frá hon kom í lógina, til lógin fór úr gildi 1. januar 2018.
Sum vanligt var í 1994, vóru fáar og yvirskipaðar viðmerkingar til lógaruppskotið og eisini til hesa ásetingina.

Í generellu viðmerkingunum stendur:

> at landsstýrið heldur, at nú má støða takast til princippið við veiðiloyvi til fult riknar og ikki fult riknar útróðrarbátar til fiskifør undir 20 BRT.

Og einasta viðmerking til nr. 9 er hendan:

> Greinin hevur til endamál at geva landstýrinum tær neyðugu heimildirnar til tess at regulera fiskiskapin samsvarandi endamálinum í lógini. Tað er tí neyðugt at hava nærri reglur um fiskidagaskipan innan og uttan fyri fiskidagaleiðina og reglur um hvussu fiskifør verða at rokna sum vinnuliga rikin og ikki.

Ein yvirskipað heimild var sostatt at skipa fiskiskapin í § 9, stk. 1, 1. pkt., og síðani ein meira ítøkilig heimild viðvíkjandi teimum fullriknu og ikki fullriknu bátunum í § 9, stk. 1, nr. 9. Leggjast skal til merkis, at umframt yvirskipaðu heimildina kundu m.a. gerast reglur um tað, sum síðani var ásett í § 9. Heimildin var sostatt rættiliga víð.

Øll rættindi sambært løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap vóru søgd upp og fóru úr gildi 1. januar 2018, og nýggj lóg kom í gildi við løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, ll.nr. 161 frá 2017.

Í hesi lóg var ásett í § 74, stk. 4, at fiskidagar, tillutaðir bólki 5 sambært stk. 1, verða latnir sum felags fiskidagar. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur fyri, hvør er at meta sum fult rikin og ikki fult rikin útróðrarbátur, og reglur um inntøkumørk og veiðinøgdir... stk. 5 í uppskotinum...

Serligu viðmerkingarnar til § 74, stk. 5 vóru hesar:

> Stk. 5. Smærru útróðrarbátarnir (bólkur 5) fáa fiskidagar sum felags fiskidagar. Tøkir dagar hjá bólkinum í 2018 eru tað dagatal, ið er ásett í grein 85, stk. 1, nr. 6, frádrigið dagarnar, ið eru brúktir í tíðarskeiðinum 1. september 2017 til 31. desember 2017.

Tann 1. januar 2020 kom sjófeingislógin í staðin fyri løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi.

Í upprunauppskotinum var ásetingin í § 19, stk. 5 og ljóðaði soleiðis:

> Stk. 5. Fiskidagar, tillutaðir bólki 5 sambært stk. 1, verða latnir sum felags fiskidagar. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur fyri, hvør er at meta sum fult rikin og ikki fult rikin útróðrarbátur, og reglur um inntøkumørk og veiðinøgdir, og hvussu ásetta fiskidagatalið hjá bólkinum verður brúkt og býtt millum fult riknar og ikki fult riknar útróðrarbátar.

Tann samtykta orðingin í upprunalógini er eins og uppskotna orðingin.

Serligu viðmerkingarnar til ásetingina í lógaruppskotinum eru hesar:

> Stk. 5. Smærru útróðrarbátarnir (bólkur 5) fáa fiskidagar sum felags fiskidagar. Eins og í verandi lóg er heimilað landsstýrismanninum at gera nærri reglur fyri, hvør er at meta sum fult rikin og ikki fult rikin útróðrarbátur, og reglur um inntøkumark og veiðinøgdir. Nýtt í hesum uppskoti er, at sagt verður neyvari, at landsstýrismaðurin kann gera reglur um, hvussu

> ásetta fiskidagatalið hjá bólkinum verður býtt millum fult riknu og ikki fult riknu útróðrarbátarnar. Endamálið við hesi áseting er at hava eina umsitingarliga smidliga skipan fyri, hvussu ásetta dagatalið í bólki 5 verður brúkt og býtt millum fult riknar og ikki fult riknar, sum m.a. leggur upp fyri, at driftin í bólkinum er rættiliga ymisk frá einum tíðarskeiði til annað, og eisini millum fiskiár...

Í løgtingslóg nr. 185 frá 2020 verða gjørdar umfatandi broytingar av § 19, tí fiskidagaskipanin frameftir skal regulerast við kunngerð ístaðin fyri við lóg. Í hesum sambandi verður § 19, stk. 5 til § 19, stk. 2 og ásetingin verður broytt. Broytingin hevur tó ongan týdning fyri skipanina við teimum fullriknu og ikki fullriknu útróðrarbátunum.

Í uppskotinum er ásetingin orðað soleiðis:

> Stk. 2. Fyri bólk 5, sambært § 18, stk. 1, ásetir landsstýrismaðurin nærri treytir fyri at fáa fiskiloyvi, umframt reglur um, hvussu ásetta fiskidagatalið hjá bólkinum verður brúkt og býtt millum fullriknar og ikki fullriknar útróðrarbátar, hvør er at meta sum fullrikin og ikki fullrikin útróðrarbátur, og reglur um inntøkumørk og veiðinøgdir. ...

Serligu viðmerkingarnar til orðingina eru hesar:

> "Stk. 2. Eins og í galdandi lóg verður heimilað landsstýrismanninum at gera nærri reglur um, hvussu ásetta fiskidagatalið hjá smærru útróðrarbátunum (bólkur 5) verður brúkt og býtt millum fullriknar og ikki fullriknar bátar, og hvør er at meta sum fullrikin og ikki fullrikin útróðrarbátur. Sum nýggj áseting verður skotið upp at geva landsstýrismanninum heimild at áseta treytir fyri at fáa fiskiloyvi í bólki 5. Fyri at avmarka skaran av rættindahavarum í bólki 5, hevur í nógv ár verið ásett, at fiskiloyvi kann vera latið báti, sum er skrásettur í Føroyum áðrenn 1. januar 1995 ella í tíðarskeiðinum 1995-2002. Henda skipan fer rættiliga langt aftur í tíð og hevur stundum víst seg at vera heldur tung at umsita. Fyri at skipanin skal vera smidlig og greið at umsita, verður skotið upp at heimila landsstýrismanninum at seta nærri treytir fyri, hvør kann fáa fiskiloyvi í bólki 5 í fiskidagaskipanini. Grundsjónarmiðið er, at tá heimildirnar í hesi grein verða brúktar, skal dentur eisini frameftir leggjast á at hava eina umsitingarliga skipan fyri smærru útróðrarbátarnar, sum leggur upp fyri, at driftin í bólkinum kann vera rættiliga ymisk frá einum tíðarskeiði til annað og millum fiskiár, og har eitt hóskandi fiskidagatal verður sett av til fullriknu útróðrarbátarnar í bólkinum."

Onki bendir á, at ætlanin hevur verið at broyta heimildirnar viðvíkjandi fullriknu og ikki fullriknu bátunum, tá tær vóru settar í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi.

Sum tað framgongur av omanfyri standandi, so verður ein orðing skoytt upp í ásetingina í sjófeingislógini, soleiðis at heimildin fevnir um "at áseta hvussu ásetta fiskidagatalið hjá bólkinum verður brúkt og býtt millum fult riknar og ikki fult riknar útróðrarbátar". Sum viðmerkingarnar eru orðaðar er ikki greitt, um talan er um eina nágreinan av verandi heimild ella eina víðkan.

Samanumtikið meta vit tó, at heimildin óansæð fevnir m.a. um at áseta, hvør er fullrikin og ikki fullrikin, at býta dagar millum fullriknar og ikki fullriknar bátar, og at tað liggur í hesum, at heimildin eisini fevnir um handfaringina av býtinum av døgum í sambandi við, at bátar verða skiftir út o.s.fr., sum er støðan í hesum ítøkiliga máli.

> Sum vit tó eisini hava ført fram, so eru núverandi reglur ikki nøktandi. Tær hava við sær, at tað ber ikki til at skifta fiskifarið út og varðveita A-loyvið, tí rætturin til A-loyvi er í dag knýttur at ávísum persóni og ávísum fiskifari. ..."

Tann 21. oktober 2024 spurdi umboðsmaðurin klagarin um virksemið hjá honum eftir keyp av øðrum fiskifari í 2023 hevði verið avmarkað av, at hann ikki fekk fiskiloyvi 5A, men ístaðin fekk fiskiloyvi 5B. Víst varð til skriv frá Fiskivinnu og samferðslumálaráðnum frá 20. august 2024 og skriv klagarans frá 12. september 2024.

Tann 1. november 2024 sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi skriv:

> "...
> Sum liður í upplýsing av málinum spyr Løgtingsins Umboðsmaður hvørt virksemið hjá mær, sum nú er, "á nakran hátt hevur verið avmarkað av einum B fiskiloyvi ístaðin fyri eitt A fiskiloyvi
>
> Til hetta er at siga at hóast hetta er annað árið við B-fiskiloyvi, so kann eg framvegis ikki svara eintýðugt uppá tygara spurning...
>
> Um vit hyggja at fíggjarliga partinum, so havi eg enn ongan miss havt av at vera B-bátur, hvørki í fjør ella í ár, men árið er ikki liðugt enn, so eg veit ikki, um eg komi at missa, tí eg veit ikki um dagarnir verða uppbrúktir áðrenn ársskiftið.
> ...
>
> Argumentið, sum Vørn - og nú eisini FMR - førir fram um, at eg ikki eri verri stillaður við at vera í bólki 5B, eftirsum tað er nóg mikið av døgum, er ikki bert óviðkomandi, men eisini eitt uppáhald sum einki hald er í ...
>
> Nýtslan av døgum er tengd at fleiri viðurskiftum, so sum góður ella vánaligur fiskiskapur, gott ella vánaligt veður og sum í ár av verkfallinum á arbeiðsmarknaðinum:...
>
> Mín pástandur er, at um viðurskiftini omanfyri – sum hvørki Fiskimálaráðið ella VØRN hava ávirkan á - høvdu havt lagað seg eitt sindur øðrvísi so vóru dagarnir hjá bólki 5 B fyri langari tíð síðani uppi og B var longu nú vorðin lagdur....
>
> Á omanfyristandandi grundarlagi kann eg tí ikki geva Løgtingsins Umboðsmanni eitt endaligt svar uppá spurningin um avmarkingar av mínum virksemi, fyrr enn árið (2024) er liðugt...."

Tann 4. november 2024 vórðu viðmerkingarnar frá klagaranum sendir ráðnum til kunningar og møguligar viðmerkingar.

Tann 14. november 2024 svaraði ráðið, at tey halda fast við tað, sum tey áður hava ført fram. Viðmerkt varð, at síðani skipanin við A- og B-loyvum bleiv innførd í 1996, hava tað bert verið trý fiskiár, har allir tillutaðir dagar hava verið brúktir.

Tann 18. november 2024 sendi umboðsmaðurin viðmerkingarnar frá ráðnum klagaranum til kunningar. Viðmerkt varð, at umboðsmaðurin metti, at framhaldandi partshoyring ikki var neyðug, og at umboðsmaðurin nú fór undir at viðgera málið.

Tann 19. november 2024 sendi klagarin umboðsmanninum skriv, har viðmerkt varð, hvussu gongdin í nýtsluni av fiskdøgum hevði verið.

Tann 27. november 2024 sendi umboðsmaðurin viðmerkingar frá klagaranum frá 19. november 2024 til ráðið til kunningar.

Tann 9. januar 2025 boðaði umboðsmaðurin klagaranum frá, at farið varð undir endaligu viðgerðina av málinum.

## 5. Lógargrundarlagið (søguliga gongdin í lóggávuni innan vinnuligan fiskiskap og sjófeingi verður ikki endurgivin her)

**Sjófeingislógin (** lóg nr. 152 frá 23. des. 2019 um sjófeingi v.br.) hevur í § 2 hesar allýsingar, sum eru viðkomandi fyri veiðirættindi í bólki 5 (bátar undir 15 tons):

3) Vinnuligur fiskiskapur: Fiskiskapur, ið ikki er til húsbrúks.
4) Fiskiár: Álmanakkaárið, um annað ikki er ásett.
5) Veiðiloyvi: Tann rættur, ið landsstýrismaðurin veitir eigara av ávísum fiskifari undir føroyskum flaggi at reka vinnuligan fiskiskap við fiskifarinum.
6) Fiskiloyvi: Tann rættur, sum eigari av ávísum fiskifari fær at veiða av ávísum livandi sjófeingi á ávísum leiðum í einum fiskiári

Í § 4 er ásett soleiðis um veiðiloyvi:

> **§ 4.** Fyri at reka vinnuligan fiskiskap krevst, at fiskifar hevur veiðiloyvi og fiskiloyvi, uttan so at annað er ásett í hesi løgtingslóg.
> *Stk. 2.* Fiskifør, minni enn 15 tons, nýtast tó ikki veiðiloyvi fyri at reka vinnuligan fiskiskap.

Skipan av fiskiskapinum hjá fiskiførum undir føroyskum flaggi í føroyskum sjógvi eru ásettar í kap. 5 (§§ 18-22) í Sjófeingislógini. Skipanin er grundað á ávíst fiskidagatal fyri hvørt fiskiár fyri ymisku viðkomandi skipabólkarnar.

Sambært § 18, stk. 1, nr. 5 í Sjófeingislógini, fevnir bólkur 5 í fiskidagaskipanini um útróðrarbátar undir 15 tons á veiðu við húki. Sambært stk. 2 verður rætturin til fiskidagar sambært stk. 1, nr. 1-5 latin teimum, sum í 2019 høvdu henda rætt, ella teimum, sum hesin rættur seinni er fluttur til.

Um bólk 5 er í § 19, stk. 2 í Sjófeingislógini ásett soleiðis:

> Stk. 2. Fyri bólk 5, sambært § 18, stk. 1, ásetir landsstýrismaðurin nærri treytir fyri at fáa fiskiloyvi, umframt reglur um, hvussu ásetta fiskidagatalið hjá bólkinum verður brúkt og býtt millum fullriknar og ikki fullriknar útróðrarbátar, hvør er at meta sum fullrikin og ikki fullrikin útróðrarbátur, og reglur um inntøkumørk og veiðinøgdir.

Um avhending og flyting av loyvum og rættindum í bólki 5 er ásett soleiðis í § 32:

> **§ 32.** Fiskiloyvi til fiskiskap í bólki 5, sambært § 18, stk. 1, nr. 5, kann flytast á annan bát uttan fiskiloyvi í sambandi við, at bátur verður skiftur út, treytað av, at fiskiorkan ikki økist. Loyvt er ikki at flyta fiskiloyvi á bát størri enn 15 tons.
> *Stk. 2*. Fiskiloyvi hjá tveimum bátum í bólki 5, sambært § 18, stk. 1, nr. 5, kann flytast á annað fiskifar við ongum fiskiloyvi treytað av, at fiskiorkan ikki økist. Loyvt er ikki at flyta fiskiloyvi á fiskifar størri enn 15 tons.
> *Stk. 3.* Skiftir fiskifar við fiskiloyvi eigara, kann fiskiloyvið fylgja fiskifarinum, um nýggi eigarin lýkur treytirnar fyri at reka vinnuligan fiskiskap undir føroyskum flaggi í hesi løgtingslóg.
> *Stk. 4*. Landsstýrismaðurin kann eftir umsókn veita eigara av fiskifari í bólki 5, sambært § 18, stk. 1, nr. 5, sum verður tikið úr vinnuligum fiskiskapi, tilsøgn um, at fiskiloyvið innan tvey ár kann flytast á annað fiskifar samsvarandi stk. 1 ella stk. 2. Landsstýrismaðurin kann í serligum førum víkja frá 2 ára tíðarfreistini.
> *Stk. 5.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um mannagongd og treytir fyri umsiting av hesi grein.

**Kunngerð nr. 76 frá 22. mai 2019 um treytir fyri fiskiloyvi 5A og 5B**
Landsstýrismaðurin hevur við heimild í § 19, stk. 2 í sjófeingislógini lýst kunngerð nr. 76 frá 2019, um treytir fyri fiskiloyvi 5A og 5B og reglur um býtið av fiskidagatalinum hjá bólki 5.

§ 2, stk. 1, nr. 1 ásetur treytirnar fyri nær fiskiloyvi 5A kann útskrivast, og er soljóðandi:

> § 2. stk. 1 Fiskiloyvi 5 A kann eftir umsókn verða skrivað eigara av fult riknum fiskifari í bólki 5:
> 1) um eigarin við fiskifarinum, næstseinasta álmanakkaárið fyri umsóknarárið, hevur avreitt fyri minst kr. 200.000, og
> 2) um inntøkan hjá eigaranum, sum ikki stavar frá útróðri, næstseinasta álmanakkaárið fyri umsóknarárið, í mesta lagi hevur verið kr. 150.000. ( ikki sett í gildi)

Kunngerðin hevði upprunaliga eitt stk. 5, um útskriving av fiskiloyvi A hóast treytirnar í stk. 1 nr. 2 ikki vóru loknar, men er gildiskoman av stk. 5 síðani 2020 útsett árliga við 1 ári, seinasta útseting var gjørd við k. nr. 136 frá 2024 ígildiskoma útsett til 1. jan. 2026. Stk. 5 er annars soljóðandi:

> Stk. 5 Um ein persónur, sum lýkur treytirnar sambært stk. 1, nr. 2, keypir ein bát í bólki 5, ið lýkur treytirnar í stk. 1, nr. 1, kann hesin, eftir umsókn, fáa skrivað eitt fiskiloyvi 5A

Hvat viðvíkur fiskiloyvi 5 B, so er í § 3 ásett:

> Fiskiloyvi 5 B kann, eftir umsókn, verða skrivað eigara av fiskifari í bólki 5, um treytirnar sambært § 2, stk. 1 ikki eru loknar.

**Kunngerð nr. 133 frá 6. desember 2023, nevnd Fiskiorkukunngerðin**
Kunngerðin fyriskrivar mannagongdir og treytir um fiskiorku, tá rættindi verða flutt millum fiskifør í fiskidagaskipanini í føroyskur sjógvi. Kunngerðin hevur m.a. heimild í § 32, stk. 5 í Sjófeingislógini, men viðgerð ikki spr. um fiskiloyvi 5A ella 5B.

## 6. Niðurstøða

Klagumálið snýr seg um, at Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið staðfesti avgerð hjá Vørn um at skriva klagaranum eitt fiskiloyvi 5B, meðan klagarin metti seg hava rætt til fiskiloyvi 5A.

Avgerðin varð grundað á, at grundarlag var ikki fyri at skriva klagaranum eitt A-loyvi, tí hann leyk ikki treytirnar, sambært § 2, stk. 1, nr. 1 í kunngerð nr. 76 frá 2019. Víst var á, at fiskiloyvi í bólki 5A einans kundi skrivast eigara av fult riknum fiskifari í bólki 5, um eigarin við fiskifarinum næstseinasta álmanakkaárið fyri umsóknarárið hevði avreitt fyri minst 200.000 kr. Klagarin skifti fiskifarið út í 2023.

Avgerðandi reglurnar fyri viðgerðina av klagumálinum eru ásetingarnar í § 19, stk. 2 og § 32, stk. 3 í Sjófeingislógini og kunngerð nr. 76 frá 22. mai 2019 um treytir fyri fiskiloyvi 5A og 5B.

Rættindi innan bólk 5 verða sambært ráðnum latin persóni ella felagi og síðani knýtt at fiskifari. Avreiðingarvirðið er ein faktor til meting av, um persónurin/felagið rekur vinnuligan fiskiskap ella ikki, og um hann tí skal hava eitt 5A loyvi ella 5B loyvi. Fiskifarið er, sambært klagaranum og ráðnum, bert eitt "aktiv".

Bæði klagarin og tann, sum klagarin keypti fiskifar frá í 2023, høvdu fiskiloyvi 5A frammanundan sølu/keyp í 2023 og lótu veiðiloyvið fylgja við keypinum.

Tað er samanketingin av avreiðingarvirðinum næstseinasta árið fyri umsóknarárið við fiskifar og eigara, sum ger, at klagarin, sambært Vørn og ráðnum, ikki hevur møguleika at fáa eitt 5A loyvi tvey tey fyrstu árini eftir, at hann hevur útvegað sær nýtt fiskifar.

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið setir í frágreiðing síni sjálvt spurning við, um tað er sakligt at krevja, at treytin um avreiðingarvirðið skal vera lokin fyri sama fiskifarið, og viðmerkir, at hetta helst er meira ivasamt, og at møguliga kundi ásetingin í kunngerðini § 2 stk. 1, nr, 1 rúmað aðrari siðvenju.

Í kunngerðini er eingin galdandi áseting, sum regulerar umstøðurnar við skifti ella nýkeyp av fiskifari, tí ætlaða stk. 5 í kunngerðini er ikki sett í gildi. Hinvegin so innihalda § 32 og 33 í Sjófeingislógini og Fiskiorkukunngerðin frá 2023 reglur um avhending og flyting av loyvum og rættindum í bólki 5.

§ 32 stk. 3 í Sjófeingislógini er soljóðandi:

> *"Stk. 3.* Skiftir fiskifar við fiskiloyvi eigara, kann fiskiloyvið fylgja fiskifarinum, um nýggi eigarin lýkur treytirnar fyri at reka vinnuligan fiskiskap undir føroyskum flaggi í hesi løgtingslóg."

Serligu lógarviðmerkingarnar til § 32 stk. 3 (stk. 2 í lógaruppskotinum LM-015/2019 s.87-88), sum klagarin eisini hevur víst á, eru soljóðandi:

> "Hendan greinin ásetir serstakar reglur um, hvussu rættindi hjá útróðrarbátum í bólki 5 í fiskidagaskipanini kunnu flytast ella skifta hendur. Talan er í høvuðsheitum um somu reglur, sum eru í verandi sjófeingislóg. Her er at viðmerkja, at bátar í bólki 5 og bátur undir 15 tons yvirhøvur hava ikki veiðiloyvi, men bert fiskiloyvi. Í sambandi við flyting og avhending av rættindum fær fiskiloyvið hjá hesum bátum líknandi støðu sum veiðiloyvi.
> ...
> Stk. 2. Rættindahavari kann við hesi áseting selja bát og lata veiðirættindini fylgja við bátinum. Tað, ið fylgir við slíkari sølu, er rætturin at fiska undir fiskidagaskipanini í bólki 5. Tað vil siga, at talan er ikki um rætt til t.d. fiskiloyvi 5A ella fiskiloyvi 5B."

§ 32 stk. 3 tryggjar sostatt bert, at klagarin, sum keypari av einum fiskifari, kann fáa veiðirættindi við í keypinum, um hann frammanundan leyk treytirnar fyri at reka vinnuligan fiskiskap sambært Sjófeingislógini. Ásetingin regulerar tó ikki spurningin um nýggi eigarin skal hava fiskiloyvi 5A ella 5B. Fiskiorkukunngerðin frá 2023 hevur heldur ikki reglur, sum viðvíkja spurninginum um fiskiloyvi 5A ella 5B.

Tað er sostatt greitt, at tað ikki er nøkur lógaráseting ella áseting í kunngerð, sum beinleiðis ásetir, hvussu spurningurin um fiskiloyvi 5A ella 5B skal viðgerast í samband við útskifting av fiskifari í bólki 5.

Umstøðurnar í hesum ítøkiliga málinum vísa eftir míni metan, at neyðugt er at fáa meira greiðu og samanhang í skipanini við fiskiloyvum 5A og 5B.

Sum skilst av málsupplýsingunum, viðurkennir ráðið, at støðan við fiskiloyvum 5A og 5B er óhaldbar, og arbeiðir ráðið við at gera broytingar í kunngerðini. Eg hefti meg í hesum sambandi við, at ráðið í frágreiðing til mín, dagfest 20. august 2024, skrivar:

> “ Trupulleikin við, at treytin fyri A-loyvi ikki kann lúkast, tá fiskifar verður skift út, hevur ikki verið partur av arbeiðinum við kunngerðini, sum higartil hevur verið, men er nú eisini settur á skrá.
>
> Tað er undir øllum umstøðum eyðsæð, at støðan ikki er nøktandi. Ráðið umhugsaði eisini at finna aðra loysn í hesum máli. Tað er tó trupult at gjøgnumskoða eina haldbara og varandi loysn, sum tekur atlit at øllum viðurskiftum innan fyri so stutta tíð.
>
> Hetta, saman við tí støðu, at tað ikki hevur veruligar avleiðingar fyri klagaran at hava eitt fiskiloyvi 5 B, til hann aftur lýkur treytina um eitt fiskiloyvi 5A, førdi til, at Ráðið valdi at halda fast við verandi rættarstøðu. Tað varð eisini havt fyri eyga, at kunngerðin skal endurskoðast í næstum. “

Avgerðarvirksemi hjá einum myndugleika er avmarkað av lógarheimildini fyri viðkomandi øki. Í hesum føri er reguleringin av, hvør kann fáa útskrivað fiskiloyvi 5A ella 5B, ásett í kunngerð nr. 76 frá 2019, sum hevur heimild í Sjófeingislógini § 19, stk. 2.

Av tí at reglurnar í stk. 5 í kunngerð nr. 76 frá 2019 ikki eru settar í gildi, inniheldur kunngerðin ikki nakrar galdandi reglur um skifti av fiskifari. Kunngerðin hevur ei heldur heimild í § 32 stk. 5 í Sjófeingislógini, sum annars ásetur reglurnar fyri útskiftan av fiskifari, men heimild í § 19, stk. 2 í Sjófeingislógini, sum er heimildin at áseta nærri treytir fyri fiskiloyvi í bólki 5, býti av fiskidagatalinum hjá bólkinum, og hvør er at meta sum fullrikin og ikki fullrikin útróðrarbátur.

Tá kunngerðin ikki hevur heimild í § 32 stk. 5, og kunngerðin ikki hevur nakra áseting, sum regulerar skiftið av fiskifari, er eyðsæð, at ivi stendst um, hvussu tað av røttum eigur at verða farið fram í mun til spurningin um fiskiloyvi 5A og 5B, tá fiskifør verða skift út í bólki 5.

Útskifting av fiskifari er eitt natúrligt fyribrigdi og fer tí at gerast neyðugt fyrr ella seinni. Tað er tí at meta sum mangul í lóggávuni (lóg/kunngerð), at eingin galdandi regla er um hesi viðurskifti. Siðvenjan hjá Vørn kann, eftir mínum tykki, heldur ikki sigast at útfylla mangulin á reglum á nøktandi hátt, tá siðvenjan má sigast at skapa eina ósamanhangandi skipan. Hartil kann skipanin stilla rættindahavara, sum útskiftir fiskifar, verri í mun til rættin til fiskidagar enn frammanundan, hóast vinnuvirksemið er óbroytt, og nýggja fiskifarið annars lýkur tær treytir, sum eru fyri fiskifør í bólk 5.

Givið er, at Vørn í ítøkiligu støðuni ikki hevði grundarlag fyri at nokta at útskriva eitt fiskiloyvi til bólk 5 til klagaran. Vørn hevði tó ikki nakra áseting at halda seg til, sum gav klagaranum rætt til fiskiloyvi 5A, og varð tí avgjørt at skriva út fiskiloyvi 5B eftir § 3, sum er ein uppsamlingsáseting í fall, at rættindahavarin í bólki 5 ikki fær fiskiloyvi 5A.

Orðingin í § 2 stk.1, nr. 1 í kunngerðini gevur ikki nakra greiða ábending um, at ásetingin um, at 2 ára gamla vinnustøðan hjá rættindahavaranum er ætlað eisini at fevna um støðuna, tá fiskifar verður skift út. Heldur tykist tað, sum orðingin bendir á, at reglan er ætlað eini støðu, har alt er tað sama – t.v.s. har einki skift er av fiskifari. Tað er tí trupult at finna tulkingarískoyti fyri, at tað er ein tilætlað støða, at rættindahavi, sum hevur fiskiloyvi 5A, skal stillast verri, um hann útvegar sær annað fiskifar.

Samanumtikið haldi eg tað tí vera ivasamt at knýta skifti av fiskifari at ásetingini í § 2 stk. 1 nr. 1 í kunngerð nr. 76 frá 2019. Grundað á, at tað ikki finst nøkur beinleiðis lógar- ella kunngerðaráseting, sum gevur rættindahavara rætt til fiskiloyvi 5A heldur enn 5B eftir skifti av fiskifari, havi eg tó ikki grundarlag fyri at siga, at siðvenjan hjá Vørn er beinleiðis í stríð við ávísa lógar- ella kunngerðaráseting.

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið hevur hvørt ár síðan 2020 útsett ígildisetanina av reglunum í kunngerðini um skifti av fiskifari í bólki 5 (§ 2 stk. 5). Ráðið hevur greitt frá, at hetta skyldast, at reglan er knýtt at inntøkumarkinum í § 2, stk. 1, nr. 2, (onnur inntøka), sum ikki er í gildi, og at reglan í stk. 5 tí ikki kann virka uttan, at skipanin verður broytt. Harvið hevur ráðið í fleiri førum eisini havt høvi at viðgera spurningin um fiskiloyvi 5A ella 5B í sambandi við útskifting av fiskifari. Ráðið hevur tó ikki gjørt neyðugar reglur um hesi viðurskifti, men hevur eftir míni meting bara latið staðið til í alt ov langa tíð. Hetta er ikki nøktandi.

Eg fari tí at geva tí Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum eina átalu fyri óneyðugt drál við at áseta neyðugar reglur um, hvørja ávirkan skifti av fiskifari skal hava á spurningin um fiskiloyvi 5A og 5B.

Eg fari samstundis at heita á ráðið um sum skjótast at gera lóggávu – lóg ella kunngerð – sum skipar viðurskiftini, tá eigari av fiskifari við fiskiloyvi 5A skiftir fiskifar.

Hvat viðvíkur ítøkiliga málinum vísa upplýsingarnar á heimasíðuni hjá Vørn, at tað hava verið nokk av fiskidøgum til bólk 5 bæði í 2023 og 2024, eisini til rættindahavarar við fiskiloyvi 5B. Hetta, og at eg ikki havi grundarlag fyri at siga, at ivasama siðvenjan hjá Vørn beinleiðis fer út um heimildargrundarlagið sambært Sjófeingislógini og tilhoyrandi kunngerð nr. 76 frá 2019, hevur við sær, at eg ikki geri meira við ítøkiliga málið.

Við tað at eg haldi, at Sjófeingislógin og kunngerð nr. 76 frá 2019 mangla ásetingar um, hvørja ávirkan útskifting av fiskifari skal hava á spurningin um rætt til fiskiloyvi 5A ella 5B, fari eg samsvarandi § 12 í umboðsmanslógini at senda fráboðan til Løgtingið og viðkomandi landsstýrismann um lóggávuni.

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður